# EB/STREYMUR STEYPAVINNARI 2010

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo




## Gunnar og Tranmere taptu

Tranmere Rovers, sum hevur føroyska Gunnar Nielsen í málinum, taptu fyrsta dystin í League One kappingini hetta kappingarárið. Gunnar Nielsen byrjaði inni fyri Tranmere Rovers, sum í dag tók ímóti Oldham Athletic á Prenton Park í Liverpool. Støðan gjørdist 2-1 til gestirnar, ið hava fyrrverandi Manchester City leikaran Paul Dickov sum venjara. Oldham kom á odda 2-0, áðrenn Tranmere fekk minkað um munin. Sambært heimasíðuni hjá Tranmere Rovers, so var tað fyrra málið eitt beinleiðis fríspark. Seinna málið kom tá tíggju minuttir manglaðu av dystinum. Tað var eitt gott skot stutt uttanfyri brotsteigin og tað var lítið, ið Gunnar kundi gera við tað. Stutt eftir minkaði Tranmere Rovers um munin til endaliga úrslitið 2-1. League One er triðbesta deildin í Onglandi. Gunnar Nielsen er útleigaður frá Manchester City fram til jólar.



FEGNIR SUNDALAGSMENN

# EB/STREYMUR ER STEYPAVINNARI 2010!

**EB/Streymur er vinnari av Løgmanssteypinum fyri triðju ferð upp á bara fýra ár. Tað er staðfestingin eftir at EB/Streymur fríggjakvøldið vann steypafinaluna ímóti ÍF í Djúpumýru í Klaksvík. Meðan sundalagsmenn kunnu fegnast um triðja steypasigurin, so munnu fuglfirðingar iðra seg um at avgerandi málið í dystinum minti um eina jólagávu á summri**

Tróndur Arge

Longu ein hálvan tíma undan dystarbyrjan eru flestu áskoðararnir komir upp á pláss. Stemningurin er sum næstan ikki sæð fyrr í Føroyum. Sundalagsfólk prýða eina hálvu av sitiplássunum við svørtum og bláum, meðan fuglfirðingar prýða hina hálvuna við reyðum. Har ímillum eru nakrir fuglfirðingar so hugskotsríkir, at teir hava latið seg í sum jólamenn, ið eisini eru í reyðum og hvítum, eins og ÍF.

Tað er fullsett kring vøllin í Djúpumýru í góðveðrinum, tá teir 22 leikararnir saman við teimum fýra dómarunum koma á vøllin. Tað eru settir fýra trailaravognar upp kring vøllin, soleiðis at pláss er fyri fleiri áskoðarum. Tað eydnaðist væl og serliga tí, at tað gav ein kenslu av, at tað er ein kompakta fjøld kring vøllin. Tað gevur ein góðan stemning í Djúpumýru.

### Vandamiklir møguleikar til ÍF

ÍF hevur til hendan dystin fingið eina serliga troyggju at spæla í, sum er reyð við hvítum strípum. EB/Streymur er í sínum eyðkendu svørtu og bláu troyggjum. Tað eru sundalagsmenn, ið byrja dystin betri og hava bóltin meir. Tað eru hinvegin fuglfirðingar, ið fáa fyrstu vandamiklu málroyndirnar, tá Fritleif í Lambanum eftir roynd frá Nenad Saric kemur til skot í 5-metrinum. Tíverri fyri hann og tey vælstuðlandi ÍF viðhaldsfólkini, so fer bólturin framvið EB/Streyma málinum. Stutt eftir ger ÍF aftur skjótt av, men skotið hjá Øssuri Dalbúð fer í síðunetið.

### Avgerandi løtan

Tá fyrri hálvleikur er 25 minuttir gamal, kemur avgerandi løtan í dystinum. Gudmund Nielsen fekk fatur á bóltinum stutt uttan fyri brotsteigin í høgru og bjóðar av. Heldur lættliga sleppur hann framvið tveimum ÍF verjuleikarum og til baklinjuna og leggur flatt innfyri. Har er málrevurin, Arnbjørn Hansen, fyrstur á, men á sjálvari málstrikuni stendur ein ÍF verjuleikari og verjir fyri. Bólturin støkkur út til 31-ára gamla Sorin Anghel, sum úr stuttari fjarstøðu leggur EB/Streym á odda 1-0. Gleðin millum sundalagsmenn fær næstan ongan enda, og tað er nærmast tøgn millum teir annars mælsku fuglfirðingarnar. 1-0 til EB/Streym!

### Sundalagsmenn verja borg

Í seinna hálvleiki eru fuglfirðingar framvegis væl við í dystinum og koma til onkrar stórar møguleikar, men EB/Streyma verjan tykist í stórum løtum hava tamarhald á ÍF álopinum. Størsta møguleikan fyri fuglfirðingar fær innskifti Jan Ellingsgaard, tá hann stútaði framvið málinum hjá René Tórgarð eftir innlegg úr høgru. Eisini Karl Løkin kom í góða skot støðu, men rakar ikki bóltin nóg væl og megnaði ikki at seta René undir trýst.

### ÍF satsar, EB/Streymur næri máli

Í eini roynd at fáa útjavnandi málið, sendir Ábraham miðverjan, Bartal Eliasen, fram í álopið. Hann fær fleiri ferðir høvdið á bóltin, men tað eydnaðist næstan ongantíð at seta EB/Streyma verjuna undir stórvegis trýst. Í hinum endanum fær EB/Streymur tveir risa møguleikar at endaliga avgera finaluna, men hvørki Hans Pauli Samuelsen ella Sorin Anghel megna at fáa bóltin í ÍF málið.

### Ransin bríkslar fyri seinastu ferð

Tá fýra minuttir eru leiktir útyvir tí vanligu leiktíðina, bríkslaði dómarin, Ransin N. Djurhuus, fyri seinastu ferð, og EB/Streyma viðhaldsfólkini kunnu fegnast saman við sínum leikarum um, at sundalagsmenn á triðja sinni eru vinnarar av Løgmanssteypinum uppá bara fýra ár. Flott og hjartaliga til lukku við tí EB/Streymur!

*trondur@sosialurin.fo*